# Hýruvogstakstirnir hækka

**Bilstøðirnar lýsa í hesum døgum við nýggjum takstum. Takstirnir hækka við umleið 10 prosentum, ella tað sama sum aðrar lønir eru hækkaðar, sigur Magnus Fuglø, formaður í Aksturvinnufelagnu m Samfylking**

HÝRUVOGNAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Príshækkingin er umleið 10 prosent, ella tað sama um aðrar lønir eru hækkaðar, sigur Magnus Fuglø, formaður í Aksturvinnufelagnum Samfylking*

Fyrr hevur tað verið soleiðis, at Aksturvinnufelagið Samfylking hevur lýst við hýruvognstakstunum. Tá kom Samfylking við prísuppskotum, sum prísráðið síðan skuldi góðtaka, men síðan prísráðið varð tikið av, er tað Kappingarráðið, sum skal góðtaka takstirnir.

Kappingarráðið krevur, at bilstøðirnar sjálvar koma við sínum uppskotum til nýggjar takstir. Tær skulu ikki gera sínámillum avtalur um prís, sigur Magnus Fuglø, formaður í aksturvinnufelagnum Samfylking.

Príshækkingin er umleið 10 prosent, ella tað sama um aðrar lønir eru hækkaðar. Minsti takstur, sum var 55 krónur, verður nú 60 krónur.

Sum nakað nýtt kostar tað 500 krónur, um fólk koma at dálka hýruvognin innan við t.d. spýggju ella øli. Fyrr hava vit ikki kunna kravt pengar frá fólki fyri at reinsa bilin, tí hava vit nú sett tað í takstin. Aðrastaðni er tað nógv dýrari, t.d. í Keypmannahavn kostar tað umleið 1.000 krónur, sigur Magnus Fuglø, formaður í Samfylking.

# Eivør og kór í Gøtu

KONSERT
*tíðindaskriv*



Sunnudagin 19. desember kl. 17 verður jólakonsert í Gøtu Kirkju við Tórshavnar Manskóri, Felagskórinum Gøta/Leirvík og Eivør Pálsdóttir. Á konsertini fara kórini hvør í sínum lagi at framføra egna skrá, meðan Eivør virkar sum solistur hjá báðum kórunum, umframt at hon framførir nøkur løg sjálv. Tað er síðsti sunnudagur í atvent, og ivaleyst eru allar hendur fullar í sambandi við jólastákanina, men hetta er eitt gott høvi at leggja saman, seta seg afturá og njóta tað besta við jólunum "jólafriðin".







## Virkisleiðari

P/F United Seafood søkir eftir virkisleiðara til virkið á Toftum. Virkisleiðarin skal hava ábyrgd av framleiðslu, rakstri, menning og umsiting av virkinum á Toftum. Virkisleiðarin luttekur aktivt í søluarbeiðinum. Virkisleiðarin myndar virkið úteftir.

P/F United Seafood Toftir framleiður saltfisk. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigi. Arbeiðið á United Seafood Toftir fer fram sambært innaneftirlitsskipan. Í 2003 virkaði virkið uml. 7.000 tons av ráváru.

**Uppgávurnar hjá virkisleiðarinum verða m.a.**

- Leiða arbeiði á United Seafood Toftir
- Gera dag- og vikuroknskapir
- Gera rakstrarætlan.
- Samstarv við søludeild og samskifti við keyparar av vørunum.
- Samstarv um keyp av ráváru.
- Samstarv við høvuðsleiðslu og aðrar virkisleiðarar.

**Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar**

- Relevanta útbúgving á passandi støði.
- Kunnleika til og royndir innan framleiðslu av fiski.
- Leiðslueginleikar.
- Góðan málkunnleika.
- Góð samstarvs- og kommunkatiónsevni.

Vit kunna bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum. Lønina tosa vit um.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 2. januar 2005.

Møguligir umsøkjarar kunna seta seg í samband við:

UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking
att: Meinhard Jacobsen ella Leivur Michelsen
Postboks 218
FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tel +298 35 55 55
Fax +298 35 55 50

UNITED seafood "Fish products from pristine waters"

REPROZ